# Spæla mikukvøldið

8. umfar í kappingini í 1. deild verður mikukvøldið. Tá eru dystirnir hesir – dómarin til dystin er nevndur í klombrum. B68-KÍ (Vinjard Dam ), ÍF-B36 (Petur Reinert), LÍF-FSV04 (Dan Olsen), TB-HB (Jens Petur Brattalíð) og SÍ-NSÍ (Andrew Christiansen).

| 1. deild menn | | | | | | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | dystir | v | - | j | - | t | | mál | mál | munur | stig |
| 1 B68 | 7 | 6 | - | 1 | - | 0 | | 23 | 5 | 18 | 19 |
| 2 FSV04 | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | | 14 | 6 | 8 | 16 |
| 3 ÍF | 7 | 4 | - | 2 | - | 1 | | 19 | 7 | 12 | 14 |
| 4 LÍF | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | | 23 | 9 | 14 | 13 |
| 5 TB | 7 | 3 | - | 1 | - | 3 | | 12 | 4 | 8 | 10 |
| 6 NSÍ | 7 | 3 | - | 0 | - | 4 | | 13 | 16 | -3 | 9 |
| 7 HB | 7 | 2 | - | 1 | - | 4 | | 10 | 20 | -10 | 7 |
| 8 KÍ | 7 | 2 | - | 0 | - | 5 | | 8 | 20 | -12 | 6 |
| 9 SÍ | 7 | 1 | - | 1 | - | 5 | | 7 | 16 | -9 | 4 |
| 10 B36 | 7 | 1 | - | 0 | - | 6 | | 3 | 29 | -26 | 3 |

## Fakta um 1. deild

7. UMFAR

HB-SÍ 2-2 (2-1)
1-0: Tróndur Sigurðsson 9.
1-1: Ingi Ole-Jacobsen 17.
2-1: Høgni M. Joensen 45.
2-2: Per Heinason 73.
Reyttkort: Tróndur Sigurðsson, HB, 44. og Svenn F. Jacobsen, HB, 86.

FSV04-TB 1-0 (0-0)
1-0: Jovan Panic 65.

B36-LÍF 0-7 (0-2)
0-1: Adrian Joensen
0-2: Adrian Joensen
0-3: Sølvi Vatnhamar
0-4: Magnus Skoralíð
0-5: Jón Eliasen
0-6: Jón Eliasen
0-7: Sølvi Vatnhamar

KÍ-ÍF 0-3 (0-0)
0-1: Nenad Saric 57.
0-2: Atli Petersen 79.
0-3: Amin Falah 82.

NSÍ-B68 0-4 (0-2)
0-1: Jósup Henriksen 35.
0-2: Jósup Henriksen 39.
0-3: Jann Ingi Petersen 76.
0-4: Mortan Hansen 80.
Reytt kort: Jónstein Petersen, NSÍ, 21., og Alexandro Casthilio, NSÍ, 78.

# Toppurin líkist sær sjálvum

**Burtursæð frá at TB misti í mun til hini oddaliðini, so líkist toppurin í næstbestu deildini nógv tí, sum hann sá út undan vikuskiftinum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Undan vikuskiftinum var B68 oddalið, og á hinum heiðursmerkjaplássunum vóru FSV04 og ÍF. Júst soleiðis er røðin eisini eftir vikuskiftið.

Felags fyri B68, FSV04 og ÍF var, at tey vunnu, og tað var eisini felags fyri tey, at mótstøðuliðið ikki megnaði at fáa mál ímóti teimum.

Tølini siga, at B68 og ÍF vunnu sannførandi sigrar á útivølli ímóti næstbestu liðunum hjá ávikavíst NSÍ og KÍ, meðan sigurin hjá FSV04 á heimavølli ímóti TB var tepur.

Størsta sigurin av øllum syrgdi LÍF fyri. Leirvíkingar vóru gestir hjá B36 í Gundadali, og LÍF vann 7-0. Hetta er næststørsti sigurin í hesum kappingarárinum. Størsti sigurin higartil var, tá ið B68 í Gundadali vann 8-0 á B36.

B68 vann 4-0 í Runavík. Toftamenn høvdu tríggjar ferðir bóltin á træverkinum hjá NSÍ.

Toftamenn vóru frammanfyri 2-0 eftir fyrra umfarið. Jósup Henriksen, sum í ár er fluttur úr KÍ og til B68, skoraði bæði málini í 1. hálvleiki og er toppskjútti í næstbestu deildini.

Tá ið teir fóru at hvíla seg, hevði NSÍ longu verið undirmannað í meiri enn 20 minuttir. Veteranurin Jónstein Petersen, sum fyri stuttum er farin at venja aftur, sá reytt fyri at hevna seg., tá ið tað framvegis var málleyst. Í 2. hálvleiki sá Alexandro Casthilio reyða kortið fyri sama lógarbrot sum liðfelagin.

Í Klaksvík leikaði javnt á fyrsta lítla tíman, tá ið tað var málleyst. Fyrsta málið fekk ÍF eftir langa framlegging og kiks í KÍ verjuni. Eftir leiðslumálið vóru fuglfirðingar greitt omaná. KÍ royndi at flyta fólkið longri fram, og tíggju minuttir undan leikloki skoraði ÍF tvær ferðir við stuttum millumbili.

Í Sandavági hevði FSV04 bóltin væl meiri enn TB. Men tað gekk illa at spæla seg til upplagdar málmøguleikar. TB legði stóran dent á verjupartin, har Bergleif Sólsker og Óli Johannesen vóru knassar í miðverjuni. Kaj Roest varð eina ferð spældur púra leysur, men FSV04 málverjin, Trygvi Askham, vardi fyri.

Í 2. hálvleiki eydnaðist tað Jovan Panic at skjóta sigursmálið fyri FSV04. Hann var púra blankur fyri málinum, eftir at nýggi brasilski miðvallarin hjá FSV04, Heron, sum var komin á vøllin stutt eftir steðgin, hevði verið við í uppspælinum.

HB hevði vitjan av illa sperda SÍ. Úrslitið var 2-2, eftir at HB í steðginum hevði verið frammanfyri 2-1. Tróndur Sigurðsson legði HB framum eftir smáar tíggju minuttir. Eftir stórt korter javnaði Ingi Ole-Jacobsen, og í síðsta minuttinum svaraði HB aftur, tá ið Høgni M. Joensen skoraði til 2-1.

Minuttin frammanundan at HB skoraði seinna málið, varð Tróndur Sigurðsson hjá HB vístur av vøllinum.

Stórt korter undan leikloki javnaði Per Heinason til 2-2 eftir hornaspark.

Fýra minuttir fyri leiklok varð Svenn F. Jacobsen hjá HB rikin av vøllinum, eftir at hann hevði fingið seinna gula kortið. Síðstu fýra minuttirnar vóru ellivu sørvingar ímóti níggju HB spælarum, men tað kom einki mál afturat.

# Formula-liðini

**Sosialurin mannar Formula-liðini við spælarunum, sum stóðu seg best í 7. og 8. umfari av Formula-kappingini.**




*Formula-liðið 7. umfar*




*Formula-liðið 8. umfar*